SPEKT | løggildir grannskoðarar

# Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum

## 437 Nesvík
## Ársfrásøgn fyri 2021

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á høvuðsstýrisfundi hjá felagsskapinum hin 10. mars 2022

Fundarstjóri

Staravegur 17, Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34

Stangaskákið 1, Postboks 346
FO-710 Klaksvík
Telefon 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Sp/f 2732

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagsskapin | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 8 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2021 | 12 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2021 | 14 |
| Notur til ársfrásøgnina | 16 |

## Leiðsluátekning

Høvuðsstýrið hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2021 fyri Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2021 umframt av virkseminum hjá felagsskapinum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2021.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Argir, tann 10. mars 2022

**Aðalskrivari**

Andrias Magnussen

**Høvuðsstýrið**

| | | |
|---|---|---|
| Símun Persson Jacobsen<br>formaður | Jan Johannesen | Ragnar Groth Mortensen |
| Jógvan Reynslág | Ovi Brim | Jørmund Foldbo |
| Annelisa Rasmussen | Beinta Klein | |

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til høvuðsstýrið í Kirkjuligu Heimamissiónin í Føroyum***

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kirkjuligu Heimamissiónin í Føroyum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2021 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni hjá felagsskapinum tann 31. desember og úrslitinum av virkseminum hjá felagsskapinum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2021 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagsskapinum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagsskapurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagsskapin steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

## Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, ætlað dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagsskapurin ikki er førur fyri at halda fram við rakstrinum.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 10. mars 2022

Sp/f SPEKT løggildir grannskoðarar

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

# Upplýsingar um felagsskapin

| | |
|---|---|
| **Felagsskapurin** | Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum<br><br>437 Nesvík<br><br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember<br>Heimstaður: Nesvík<br><br>Telefon 47 00 00<br>Telefaks 47 00 01<br><br>Heimasíða: www.mission.fo<br>t-post bústaður: info@mission.fo |
| **Høvuðsstýrið** | Símun Persson Jacobsen, formaður<br>Jan Johannesen<br>Ragnar Groth Mortensen<br>Jógvan Reynslág<br>Ovi Brim<br>Jørmund Foldbo<br>Annelisa Rasmussen<br>Beinta Klein |
| **Aðalskrivari** | Andrias Magnussen |
| **Grannskoðan** | Sp/f SPEKT løggildir grannskoðarar<br><br>Staravegur 17<br>110 Tórshavn |

# Leiðslufrágreiðing

### Ársúrslitið

Rakstrarroknskapurin hjá felagnum fyri 2021 vísir eitt yvirskot á36 tkr., og fíggjarstøðan hin 31. desember vísir eina eginogn upp á 4.249 tkr.

### Framtíðarvánir

Leiðslan metir, at úrslitið komandi ár fer at verða eitt hall upp á 359 tkr.

### Peningaviðurskifti

Fíggjarstøðan javnvigar við 45.336 tkr. Eginognin er 4.249 tkr., svarandi til 9,4%.

### Býtið av úrslitinum

Skotið verður upp, at ársúrslitið upp á 36 tkr. verður flutt til komandi ár.

# Leiðslufrágreiðing

## Útbygging av Leguhúsinum í Nesvík

Í 2014 byrjaðu veruligu fyrireikingarnar at fara undir útbyggingina av Leguhúsinum í Nesvík, tá gongd varð sett á arbeiðið við útgrevstrinum.

Á vári í 2016 góðkendi Høvuðsstýrið byggisáttmálan fyri útbyggingina, sum er í trimum byggistigum, umframt sáttmála um byggileiðslu og eftirlit. Arbeiðið hesum viðvíkjandi hevur verið nakað seinkað, men gongur framá.

Seinastu árini hevur miðvíst arbeiði verið gjørt viðvíkjandi peningainnsavnan til verkætlanina. Arbeiðið hevur gingið væl og við árslok 2020 vóru innsavnaðar 23,4 mió.kr. til samans til endalmálið.

Í 2014 byrjaði útbyggingin av Leguhúsinum í Nesvík, og við árslok 2020 eru nýttar til samans 35,6 mió.kr. Samlaði kostnaðurin fyri útbyggingina er mettur til á leið 36,7 mió.kr. Umframt at útbyggingin verður stuðlað við gávum, hevur stýrið samtykt at taka tvey bankalán at fíggja útbyggingina. Fyrra lánið var útgoldið í 2017, meðan seinna lánið var útgoldið í 2018. Annað lánið varð hækkað við 4,5 mió.kr. í 2019. Lánini skulu gjaldast aftur yvir 15 ár.

Í mun til upprunaligu tíðarætlanina hava nakrar seinkingar verið, men høllin, skiftingarrúmini og millumgongin eru liðug og vórðu tikin í brúk 27. apríl 2019.

Triðja byggistig, sum er kamarslonin, er sjálvboðið arbeið. Ovara hæddin í kamarslonini er liðug og í niðaru hæddini eru einans smávegis snøklar eftir. Væntandi verður niðara hæddin liðug skjótt.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Føroyum er gjørdur eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki A.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

## Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagsskapurin í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagsskapurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Avleidd fíggjartól

Avleidd fíggjartól verða í fyrstu atløgu innroknað í fíggjarstøðuna til kostprís, og verða síðani virðisásett til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddum fíggjartólum verða tikin við undir aðra áogn ella aðra skuld.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjartólum, sum eru flokkað sum og lúka krøvini til váðavernd av dagsvirðinum av eini innroknaðari ogn ella skyldu, verður innroknað í rakstrarroknskapin saman við broytingum í dagsvirðinum av váðavardu ognini ella váðavardu skylduni.

## Nýttur roknskaparháttur

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjartólum, sum eru flokkað sum og lúka krøvini til váðavernd av væntaðum framtíðar peningastreymum, verður innroknað undir aðra áogn ella aðra skuld og undir eginognina. Standast ognir ella skyldur av hesi framtíðar transaktión, verða upphæddir, sum áður eru útsettar á eginognina, fluttar til keypsprísin á ávikavist ognini ella skylduni. Standast inntøkur ella kostnaðir av hesi framtíðar transaktión, verða upphæddir, sum eru útsettar á eginognina, fluttar til raksturin í tí tíðarskeiði sum tað tryggjaða ávirkar raksturin.

Fyri avleidd fíggjartól, ið ikki lúka treytirnar fyri at verða viðgjørd sum váðaverndartól, verður broytingin í dagsvirðinum innroknað í rakstrarroknskapin so hvørt.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur

Inntøkur frá gávum og innsavningum verða tiknar við í rakstarroknskapin, tá ið hesar verða latnar, meðan inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um fakturering er farin fram áðrenn árslok.

Gávur og stuðul, sum felagsskapurin móttekur til serlig endamál ella til ávísa verkætlan, sum onki hevur við dagliga raksturin av felagsskapinum at gera, verða ikki rakstrarførd, men skrásett beinleiðis í fíggjarstøðuna undir tíðaravmarkingum.

### Útreiðslur

Útreiðslur verða rakstrarførdar í tí ári tær viðvíkja.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk hjá felagsskapinum. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### Av og niðurskrivingar

Av og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

# Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Renturnar verða innroknaðar í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum.

Rentuinntøkur av støðlaðum peningi í sambandi við avsetingar verða ikki inntøkuførd í rakstrinum, men beinleiðis á avsetingarkontur.

Fíggjarligar útreiðslur fevna um rentuútreiðslur og bankakostnað í árinum.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Rentukostnaðir av lánum, ið eru tikin við beinleiðis tilknýti til framleiðslu av materiellari støðisogn, verða innroknaðir í kostprísin yvir framleiðslutíðarskeiðið. Allur óbeinleiðis lánikostnaður verður rakstrarførdur.

Kostprísurin á eini ogn verður býttur sundur í serstakar partar, ið verða avskrivaðir hvør sær, um nýtslutíðin er ymisk fyri ymsu partarnar.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er grundað á hesar metingar um nýtslutíðina á ognunum:

| | | |
|---|---|---|
| Leguhúsið og spæliplássi (gamli parturin) | Fult út avskrivað | |
| Leguhúsið, útbygging | 30 | ár |
| Tøkniogn | 3 | ár |
| Innbúgv | 3 | ár |
| Onnur rakstrargøgn | 4 | ár |

## Nýttur roknskaparháttur

Leguhúsið og spæliplássið hava verið avskrivað við somu upphædd sum lániskuldin í ávikavist leguhúsinum og spæliplássinum hevur verið niðurgoldin við. Nú øll skuldin er goldin, eru leguhúsið og spæliplássið fult út avskrivað.

Vinningur ella tap í sambandi við sølu av materiellari støðisogn verða gjørd upp sum munurin millum søluupphæddina, við frádrátti av sølukostnaði, og roknskaparliga virðið av støðisognini søludagin. Vinningur ella tap verða innroknað undir aðrar rakstrarinntøkur og -útreiðslur.

### Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til kostprís eftir FIFO háttinum. Er nettosøluvirðið lægri enn kostprísurin, verður goymslan niðurskrivað til hetta lægra virðið.

Egnar útgávur av bókum verða avskrivaðar yvir 3 ár.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum. Upphæddirnar eru metta hvør sær.

### Skyldur

Við lántøku verða fíggjarligar skyldur innroknaðar við eini upphædd svarandi til móttiknu upphæddina frádrigið transaktiónskostnaðir. Seinni verða fíggjarligu skyldurnar virðisásettar til amortiseraðan kostprís svarandi til kapitaliseraða virðið við nýtslu av effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skyldur verða virðisásettar til nettorealisationsvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, ið eru tiknar við sum skuld, fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparári

Móttiknar gávur og stuðul, sum eru oyramerktar til ávís endamál, verða innroknað undir tíðaravmarkingum; upphæddirnar verða inntøkuførdar so hvørt sum útreiðslurnar, sum gávan ella stuðulin eru latin til, vera rakstrarførd. Gávur og stuðul til útbygging av Leguhúsinum í Nesvík verða inntøkuførdar so hvørt sum Leguhúsið verður avskrivað.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2021

| | Nota | 2021<br>kr. | 2020<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | |
| Fastar gávur | | 2.603.423 | 2.696.012 |
| Innsavningar | | 418.042 | 477.601 |
| Gávur | | 675.338 | 487.192 |
| Søla av vørum | | 1.113.474 | 784.679 |
| Søla av tænastum | | 946.560 | 524.605 |
| Onnur søla | | 1.825 | 4.200 |
| Inntøka, serlig tiltøk | | 37.935 | 34.618 |
| Inntøkur, tiltøk | | 1.066.171 | 358.615 |
| Útreiðslur, tiltøk | | -908.149 | -275.607 |
| **Inntøkur til samans** | | 5.954.619 | 5.091.915 |
| Fyrisiting | | -284.478 | -400.402 |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -3.609.495 | -3.667.016 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | | -1.077.608 | -729.533 |
| Keyp av vørum | | -793.760 | -500.428 |
| Keyp av tænastum | | -99.572 | -20.660 |
| Annað keyp | | -249.750 | -219.375 |
| Fíggjarligar útreiðslur | | -58.129 | -59.325 |
| **Útreiðslur áðrenn avskrivingar v.m.** | | -6.172.792 | -5.596.739 |
| **Bruttoúrslit** | | **-218.173** | **-504.824** |
| Staðfest tap upp á skuldarar | | 0 | 0 |
| Avskrivingar o.t. | 2 | -31.655 | -32.504 |
| **Avskrivingar v.m. til samans** | | **-31.655** | **-32.504** |
| **Útreiðslur til samans** | | **-6.204.447** | **-5.629.243** |
| Útbygging av Leghúsinum, inntøkuføring stuðul | | 1.190.533 | 0 |
| Útbygging av Leghúsinum, avskrivingar | | -1.190.533 | 0 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | | **-249.828** | **-537.328** |

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2021 (framhald)

| | Nota | 2021<br>kr. | 2020<br>kr. |
|---|---|---|---|
| Vinningur við sølu av støðisogn | | 0 | 113.000 |
| Hjálparpakki | | 286.178 | 480.000 |
| **Ársúrslit** | | **36.350** | **55.672** |
| | | | |
| Flutt úrslit | | 36.350 | 55.672 |
| | | **36.350** | **55.672** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2021

| | Nota | 2021 kr. | 2020 kr. |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Grundøki og bygningar | | 35.778.857 | 0 |
| Spælipláss | | 0 | 0 |
| Innbúgv | | 7.348 | 14.696 |
| Onnur rakstrartól | | 0 | 0 |
| Tøkniogn | | 6.249 | 30.556 |
| Bygningur í gerð (útbygging av Leguhúsinum í Nesvík) | | 0 | 35.552.872 |
| **Materiell støðisogn** | 2 | **35.792.454** | **35.598.124** |
| **Støðisogn til samans** | | **35.792.454** | **35.598.124** |
| Vørugoymsla, HMF | | 237.239 | 270.495 |
| Vørugoymsla, LH | | 24.598 | 7.415 |
| **Vørugoymslur** | | **261.837** | **277.910** |
| Skuldarar | | 394.441 | 254.005 |
| Mvg-áogn | | 166.250 | 29.148 |
| Tíðaravmarkingar | | 55.219 | 78.271 |
| **Áogn** | | **615.910** | **361.424** |
| Tøkur peningur | | 3.738.597 | 3.518.332 |
| Oyramerktur peningur | 3 | 4.927.255 | 3.621.607 |
| **Tøkur peningur** | | **8.665.852** | **7.139.939** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **9.543.599** | **7.779.273** |
| **Ogn til samans** | | **45.336.053** | **43.377.397** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2021

| | Nota | 2021<br>kr. | 2020<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **Skyldur** | | | |
| Trygdargrunnur | | 2.116.404 | 2.116.404 |
| Grunnur fyri dagsvirði á avleiddum fíggjartólum | | -193.346 | -351.796 |
| Fluttur vinningur | | 2.325.522 | 2.289.173 |
| **Eginogn** | 4 | **4.248.580** | **4.053.781** |
| Bankaskuld ísv. útbygging av Leguhúsinum | | 12.586.849 | 13.419.754 |
| **Langfreistað skuld** | 5 | **12.586.849** | **13.419.754** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 5 | 832.218 | 813.704 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 805.532 | 330.844 |
| Aðrir ognarar | | 233.758 | 100.000 |
| Avsett til skylduga frítíðarløn | | 291.996 | 294.246 |
| Tíðaravmarkingar (gávur og stuðul til ávís endamál) | 6 | 26.143.774 | 24.013.272 |
| Avleidd fíggjartól | | 193.346 | 351.796 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **28.500.624** | **25.903.862** |
| **Skuld til samans** | | **41.087.473** | **39.323.616** |
| **Skyldur til samans** | | **45.336.053** | **43.377.397** |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 7 | | |

# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| 1 | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Starvsfólkalønir | 2.914.061 | 2.933.568 |
| | Eftirlønir | 429.416 | 420.142 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld | 146.118 | 150.318 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | 119.900 | 162.988 |
| | | **3.609.495** | **3.667.016** |
| | Starvsfólkatal í miðal | 13 | 13 |

## 2 Materiell støðisogn

| | Bygningar | Spælipláss | Innbúgv | Onnur rakstrartól | Tøkniogn | Bygningur í gerð |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Keypsvirði við ársbyrjan 1. januar 2021 | 5.596.540 | 455.646 | 185.841 | 797.786 | 424.537 | 35.552.872 |
| Tilgongd í árinum | 36.969.390 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1.416.518 |
| Overførsler i årets løb | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -36.969.390 |
| Keypsvirði við ársbyrjan | 42.565.930 | 455.646 | 185.841 | 797.786 | 424.537 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan 1. januar 2021 | 5.596.540 | 455.646 | 171.145 | 797.786 | 418.288 | 0 |
| Avskrivingar í árinum | 1.190.533 | 0 | 7.348 | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 6.787.073 | 455.646 | 178.493 | 797.786 | 418.288 | 0 |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2021** | **35.778.857** | **0** | **7.348** | **0** | **6.249** | **0** |
| Avskrivingartíðarskeið | 30 ár | - ár | 3 ár | 4 ár | 3 ár | - ár |

# Notur til ársfrásøgnina

| | 2021<br>kr. | 2020<br>kr. |
|---|---|---|
| **3 Oyramerktur peningur** | | |
| Oyramerktur peningur við ársbyrjan | 3.621.607 | 4.132.044 |
| Javning viðvíkjandi SAT 7 | 139.998 | 0 |
| Rentur og gávur í árinum | 3.548.832 | 1.442.425 |
| Brúkt av avsetingum | -227.798 | 0 |
| Brúkt av oyramerktum peningi til útbygging av Leguhúsinum í Nesvík: | | |
| • byggikostnaður og rentuútreiðslur | -1.416.518 | -827.261 |
| • lánsgjøld | -1.125.600 | -1.125.600 |
| Brúkt av tøkum peningi í sambandi við útbyggingina | 386.735 | 0 |
| | **4.927.256** | **3.621.608** |

Upphæddin kann sundurgreinast soleiði:

| | 2021 | 2020 |
|---|---|---|
| Trygdargrunnur | 2.116.404 | 2.116.404 |
| Gávur og stuðul til ávís endamál | 2.810.852 | 520.870 |
| Útbygging av Leguhúsinum | 0 | 984.334 |

## 4 Eginogn

| | Trygdar-grunnur | Grunnur fyri dagsvirði á avleiddum fíggjartólum | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| Upphædd 1. januar 2021 | 2.116.404 | -351.796 | 2.289.172 | 4.053.780 |
| Lagt í grunn í árinum | 0 | 158.450 | 0 | 158.450 |
| Ársúrslit | 0 | 0 | 36.350 | 36.350 |
| **Eginogn** | **2.116.404** | **-193.346** | **2.325.522** | **4.248.580** |

# Notur til ársfrásøgnina

## 5 Langfreistað skuld

| | Skuld 1. januar 2021 | Skuld 31. desember 2021 | Avdráttur komandi ár | Restskuld eftir 5 ár |
|---|---|---|---|---|
| Bankaskuld ísv. útbygging av Leguhúsinum | 13.419.754 | 12.586.849 | 832.218 | 9.064.432 |
| | **13.419.754** | **12.586.849** | **832.218** | **9.064.432** |

## 6 Tíðaravmarkingar (gávur og stuðul til ávís endamál)

### Gávur og stuðul til útbygging av Leguhúsinum í Nesvík

| | **2021** | **2020** |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 23.352.404 | 21.909.979 |
| Rentur og gávur í árinum | 1.171.050 | 1.442.425 |
| Avskrivingar í árinum | - 1.190.533 | 0 |
| | 23.332.921 | 23.352.404 |

Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum fekk í 2007 pening á kontu í sambandi við søluna av Tórshavnar Sjómansheimi. Dagliga leiðslan samtykti at oyramerkja ein stóran part av gávuni til útbygging av leguhúsinum í Nesvík, meðan restin varð lagt í Trygdargrunn, sum er bólkaður undir eginognini. Harumframt hevur Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum eisini seinastu árini fingið peningagávur, sum eru oyramerktar til nevndu útbygging. Leiðslan hevur valt, at rentur og kursjavningar av nevndu gávum skulu skrásetast beinleiðis á tíðaravmarkingar og ikki í vanliga rakstrinum.

### Gávur og stuðul til ávís endamál

| | Salda við ársbyrjan | Tilgongd í árinum | Brúkt í árinum | Salda við árslok |
|---|---|---|---|---|
| Sat 7 | 139.998 | 77.782 | 98.864 | 118.916 |
| Altjóða Missión | 190.014 | 0 | 0 | 190.014 |
| Bókaútgáva | 150.809 | 0 | 0 | 150.809 |
| Menning av Leguhúsinum | 122.029 | 0 | 0 | 122.029 |
| Serlig endamál í Vestmanna | 58.019 | 0 | 0 | 58.019 |
| Børnunum til gagns | 0 | 2.300.000 | 128.934 | 2.171.066 |
| Til samans | 660.868 | 2.377.782 | 227.799 | 2.810.853 |

# Notur til ársfrásøgnina

## 7 Veðsetingar og trygdarveitingar

Í bygningi hjá felagsskapinum hvørs roknskaparliga virði er 35.779 tkr. við árslok 2021, er tinglisið veð upp á 17.800 tkr. sum trygd fyri bankaskuld.

Felagið hevur óuppsigiligar leiguskyldur galdandi til mars 2022 á til samans 5 tkr.